# Stolu heilivág



Umframt stuldur av heilivági, var ein av monnunum eisini ákærdur fyri at hava stolið og brotið ein bil sama kvøldið

Mynd: Norðlýsið

### Tríggir mans vórðu handtiknir í Klaksvík mikunáttina

STULDUR
*eydna Skaale*

Løgreglan í Klaksvík handtók um miðnáttarleitið týskvøldið tríggjar ungar mans.

Teir eru ákærdir fyri at hava stolið heilivág frá Klaksvíkar sjúkrahúsið.

Ein medisin kista, ið var stongd við heingilási, varð brotin upp og tømd. Í kistuni vóru fleiri sløg av heilivági, m.a. nerva– og hjartaheilivágur. Vakthavandi í Klaksvík sigur, at nakað av heilivágnum, sum var í kistuni, kann samanberast við valium. Vakthavandi sigur víðari, at løgreglan beinanvegin fekk ábendingar um, hvørjir tjóvarnir vóru, og tá løgreglan kannaði menninar, høvdu teir eisini heilivágin uppiá sær.

Ein teirra varð eisini ákærdur fyri at hava stolið og brotið ein bil sama kvøldið.

**Menninir**

Enn metir løgreglan seg tó ikki hava fingið allar menninar í málinum, og vakthavandi sigur, at teir hava ábendingar um ein mann afturat, sum framvegis ikki er tikin. Handtiknu menninir eru 17, 18 og 19 ár og teir vóru nakað ávirkaðair av rúsdrekka, tá teir vórðu tiknir.

Enn er óvist um teir ætlaðu heilivágin til egna nýtslu, ella um teir møguliga ætlaðu at selja hann víðari.

# Eisini herverk

Stuldur av heilivági er ikki tað einasta, sum í seinastuni er hent í Klaksvíkini. Í fyrranáttina varð nevniliga eisini herverk framt í fleiri førum. Ein vøruvognur, ið stóð parkeraður, stóð brádliga í ljósum loga. Vandi var fyri húsunum rundanum, men vakthavandi sigur, at eingin skaði hendi, uttan á sjálvan bilin. Løgreglan kannar nú, um eldurin varð ásettur.

Seinni týsnáttina varð eisini ein bilur stolin. Tjóvarnir hava koyrt sera skjótt runt í býnum, og gjørt skaða á einar tríggjar parkeraðar bilar, umframt at gera sera stóran skaða á stolna bilin. Vakthavandi sigur, at løgerglan fann stolna bilin uppi við Klakkin, men tá vóru gerningsmenninir rýmdir.

Somu nátt var onkur eisini umborð á Ternuni, og haðani varð ein VHF'ur stolin.

Týsnáttina fekk løgreglan í Klaksvík eisini fráboðan um, at fólk høvdu verið inni í einum privathúsum og gjørt herverk um náttina, meðan húsfólki lá á loftinum og svav. Har var óruddað, okkurt var brotið og tvær flottar oljulampur vóru stolnar. Um morgunin fann húsfólkið ketilin í túninum, og súkklan hjá ommudóttirni var tveitt upp í eitt træ. Løgreglan metir, at hetta hevur samband við okkurt av hinum herverkunum, sum vóru framd, og at gerningsmenninir hava verið inni í privathúsunum og krógvað seg fyri løgregluni, sum leitaði eftir teimum um allan býin.



Ein vøruvognur, ið stóð parkeraður, stóð brádliga í ljósum loga, og vandi var fyri húsunum nærhendis

Mynd: Norðlýsið

Løgreglan í Klaksvík sigur tó, at enn er óvist um tað eru somu menn, ið stóðu aftanfyri alt herverkið, sum varð framt týsnáttina.

Eingin er tikin í málinum, og løgreglan hevur ógvuliga lítið ítøkiligt at ganga eftir.

Vakthavandi sigur, at tað einki prógv er fyri, at tað eru somu ungu menninir, ið brutu inn á sjúkrahúsið í Klaksvík, sum eisini framdu herverk runt um í býnum náttina fyri. Løgreglan arbeiðir tó víðari við málinum.

-Eys


TASKI ...mest seldu gólvvaskimaskinur
SWINGO 750/1250B

A.H.Jensen
TEL 322676



SANSIR TEL 355 355

## Kundarøktari til Kall

Kall økir alsamt um virksemið og okkum tørvar kundarøktarar.

Er tú ágrýtin, sølumindaður, góður at samstarva við, kanst arbeiða sjálvstøðugt so er tað kanska tær vit hava brúk fyri.

Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum:
- Søla til privatkundar
- Hjálp og vegleiðing til kundar
- Tilsetan av kundatænastum
- O.a. fyrifallandi skrivstovuarbeiði

Vit hugsa okkum at tú hevur royndir við at arbeiða við kundum. Arbeiðið hevur skiftandi arbeiðstíðir og neyðugt er at tú kanst arbeiða um kvøldi.

Vit kunna bjóða eitt dynamiskt og spennandi umhvørvi, har fólk hava tikið á seg at vera nýskapandi. Tú fært góðar møguleikar fyri persónligar og fakligari menning á einum arbeiðsplássi ið vil vaksa seg stórt í kunningarmeldrinum.

Lønin verður ásett eftir førleika og royndum.

Skrivlig umsókn við prógv og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 4. mars 2005 kl. 12.00

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Hevur tú spurningar til starvið kanst tú ringja til Bjarna Askham Bjarnason stjóra á telefon 502085



Kall veitir fastnet, GSM og breiðband í Føroyum. Á Kalli arbeiða í løtuni 16 fólk.

kall
Orðið er títt

Kall · Óðinshædd 2 · Tel 20 20 20 · Fax 20 20 21 · Postrúm 3299 · FO-110 Tórshavn · kall@kall.fo · www.kall.fo